Føroyakvøld við gentukóri

Týskvøldið verður seinasta føroyakvøldið í Norðurlandahúsinum á hesum sinni.

Hesi mentunarkvøldini við einum góðum føroyskum bita afturvið hava verið rættiliga væl vitjað: Um 1.000 hava verið til borðs og eini 1.400 hava verið til tað,ið fört hevur verið fram.

Á føroyakvøldinum týskvøldið verður Fuglafjarðar Gentukór við. Kórið fer at syngja ymist, ið var á skránni, tá kórið í summar var á ferð í Noregi. Tað er Frits Johannesen, ið stjórnar Fuglafjarðar Gentukóri.

Fjølbroytt skrá

Umframt fer Laura Joensen at lesa yrkingar úr leikinum "Logi, logi eldur mín", Norðstreymoyar Dansifelag fer at dansa og Birita Mohr at sýna ljósmyndir úr Havnini eftir Inga Joensen.

At enda fer Havnar Sjónleikarafelag at framføra "Tornið við heimsins enda" eftir William Heinesen.

Føroyakvøldið byrjar við borðreiðing kl. 18, meðan meiri mentaði parturin av kvøldinum byrjar kl. 19.30.

Tað er Norðurlandahúsið, sum í samstarvi við Føroya Fiskasølu og Ferðamannamiðstøðina fyrireikar kvøldið.

hj.



Á seinasta føroyakvøldinum á hesum sinni fer Fuglafjarðar Gentukór at framføra part av skránni, sungin varð á Noregs-ferðini fyrr í summar.

ÚTSØLA

okkara byrjar mánamorgunin 20. august kl. 8.00

BØRN:
Cowboybuksur 178:-
Floyals-buksur 98:-
Dýnu-buksur 98:-
Sweatshirts, blusur, skjúrtur 128:-
Cowboysett, jakki og buksur, fóðrað 298:-
Cowboy-skjúrtur 158:-
Exit buksur 258:-

KVINNUR:
Exit cowboy-buksur 258:- 198:-
Wrangler cowboy-buksur 258:-
Lærstutt cowboy 198:- 158:-
Cowboy-jakkar 298:-
Frakkar, NÚ 598:- 498:-
298:- 198:-
Chrisbuksur svartar 258:-
Cityshorts og jakkar Chris, ym. litir. Stk. ... 258:-
Stuttir ruskins-jakkar ÷30%
Leður klædnings-jakkar ÷40%
Blusur BERT 198:- 158:- 98:-
Troyggjur BERT 298:- 258:- 178:-
Dýnujakkar 3/4 langir 398:-
Blusur og buksuskjúrt Plaza, pr. stk. 258:- 198:-
Blusur, skjúrt og buksuskjúrt frá Lindon BERT 298:- 258:- 198:-
Free Lance buksur 258:-
Turri-klæði 58:-





MENN:
Cowboybuksur Wrangler og Levi's ÷20%
Cowboy-buksur 198:-
Canvas-buksur 258:-
Levi's troyggjur 398:-
Wrangler sweatshirts 198:-
Bummuls-troyggjur 258:-
Skjúrtur BERT 258:- 158:-
Dýnu-jakkar 298:-
Leður-jakkar ÷30%

Wrangler SHOP
Niels Finsensgøta 23
tlf. 14710

Pedagogar!

Søkt verður eftir 2 pedagogum, fulla tíð, til bústovnin á Mýrini 6, at byrja sum skjótast.

Annað starvið er eitt avloysarastarv fyribils fyri 1 ár, hitt starvið fyribils fyri 1/2 ár, við møguleika fyri viðari starvseting.

Samstundis verður søkt eftir einum sjúkraavloysara.

Á Mýrini 6 eru búplass fyri 11 evnaveikum, ið eru uppdeild í tveir bólkar, harav annar bólkurin er við búfólkum við stórum samfelagstrupulleikum, har vit krevja greitt uppsettar linjur og ein konsekventan pedagogikk. Til Mýrina 6 er tilknýtt 1 hús, ið koyrir eftir somu rætningslinjum sum áðurnevndi bólkur.

Tað er av stórum týdningi, at tey sum sett verða:

- kunnu arbeiða sjálvstøðugt
- kunnu átaka sær nýggjar pedagogiskar avbjóðingar
- kunnu seta greiðar linjur
- verða fleksibul
- hava hugflog
- verða samstarvshugað/ur.

Løn og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri. Umsóknin skal verða **Bústovninum á Mýrini 6** í hendi sum skjótast og seinast **15. sept. 1990.**

Nærri upplýsingar um starvið og bústovnin fáast við at ringja **tlf. 1147** og spyrja eftir **Maju Larsen,** fyristøðukvinna.

Lýsið í **sosialinum**